## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi og regn av og á. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og regn, seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 2 og 5 stig. Sunnudagin andøvsgul av landnyrðingi og kavaælingur. Hitin millum frostmarkið og +3 stig.

# "Seinking vegna tekniskar trupulleikar"

Soleiðis verður ofta nevnt, tá flogførverða seinkað av einihvørjari orsøk. Hetta boðar sjáldan frá góðum, tí ferðafólk vita av royndum, at tað kann gerast drúgt at bíða til tann teknisku trupulleikin er loystur, ella til annað flogfar kann útvegast ístaðin.

Tekniskir trupulleikar spældu nettupp føroyska flogfelagnum Atlantsflog eitt lítið puss, tá felagið boðaði til tíðindafund á Hotel Hafnia fyrrapartin í gjár. Her skuldi tann nýggja summarferðaætlanin vísast fram fyri føroysku tíðindatænastuni.

Fundurin skuldi byrja kl. 9:30, men tá byrjast skuldi, meldaðu teir teknisku trupulleikarnir seg: Teldan vildi ikki tað sama, sum maðurin aftanfyri hana.

Men ráð vóru fyri tí. Boð vórðu send til avgreiðsluna á hotellinum, og kom annar av stjórunum á hotellinum, Birna Gaard beinanvegin til hjálpar. Og lítla løtu seinni hevði hon loyst teir teknisku trupulleikarnar hjá Atlantsflog - í telduni, væl at merkja.

Henda seinkingin gekk tíbetur ikki út yvir Føroyaflúgvingina á nakran hátt, men bara útyvir tey ótolnu tíðindafólkini, sum máttu bíða í 15 min. til tíðindafundurin umsíðir kundi byrja.



*Birna Gaard, stjóri á Hotel Hafnia loysti teir teknisku (teldu)trupulleikarnar hjá leiðsluni í Atlantsflog*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -15 |
| Nuuk | -10 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 13 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | -1 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 15 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1031 hPa. við Lofoten fer suðureftir og mennist. Eitt lágtrýst, 1004 hPa. við Brest fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið verður yvir Føroyum mikudagin.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Skagerrak stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur til havið sunnan fyri Ísland gevur turrari veður hósdagin.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/3 kl. 06[00]– 29/3. 06[00]. Hitin í gjár: 5,1°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,8 mm – mált frá 28/3 kl. 06[00]– 29/3 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 64,8 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

30. mars

25. mars Fullmáni
2. apríl Seinna kvarter
4. apríl Mánin næst jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30.mars | 10.41 | 23.08 | 09.41 | 22.08 | 09.56 | 22.23 | 00.17 | 12.41 | 01.17 | 13.41 | 08.56 | 21.23 | 07.56 | 20.23 | 10.56 | 23.23 | 11.56 | - | 10.26 | 22.53 | 11.41 | - |
| 31.mars | 11.35 | - | 10.35 | 23.04 | 10.50 | 23.19 | 01.08 | 13.35 | 02.08 | 14.35 | 09.50 | 22.19 | 08.50 | 21.19 | 11.50 | - | 00.23 | 12.50 | 11.20 | 23.49 | 00.08 | 12.35 |
| 1. apríl | 00.04 | 12.34 | 11.34 | - | 11.49 | - | 02.04 | 14.34 | 03.04 | 15.34 | 10.49 | 23.31 | 09.49 | 22.31 | 00.19 | 12.49 | 01.19 | 13.49 | - | 12.19 | 01.04 | 13.34 |
| 2. apríl | 01.16 | 13.59 | 00.16 | 12.59 | 00.31 | 13.14 | 03.16 | 15.59 | 04.16 | 16.59 | - | 12.14 | 11.14 | 23.56 | 01.31 | 14.14 | 02.31 | 15.14 | 01.01 | 13.44 | 02.16 | 14.59 |
| 3. apríl | 02.41 | 15.23 | 01.41 | 14.23 | 01.56 | 14.38 | 04.41 | 17.23 | 05.41 | 18.23 | 00.56 | 13.38 | - | 12.38 | 02.56 | 15.38 | 03.56 | 16.38 | 02.26 | 15.08 | 03.41 | 16.23 |

5 707265 100036 >